MENTAMÁLARÁÐIÐ

# STJÓRI TIL NÝGGJAN VITANARSTOVN

**Hevur tú hugsjónir um skúlamenning og nýhugsan og ynskir at slóða fyri fakligari og námsfrøðiligari menning innan undirvísingarverkið, er hetta eitt áhugavert starv við nógvum avbjóðingum**

**Um starvið**
Søkt verður eftir stjóra til nýggjan vitanarstovn, sum er ein samskipan av stovnunum Føroya Skúlabókagrunni, Landsmiðstøðini fyri undirvísingaramboð, KT-deplinum og møguliga øðrum virksøkjum. Hetta er eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, har tú skalt mynda nýggja stovnin, halda fram við s amanleggingartilgongdini og saman við Mentamálaráðnum og starvsfólkunum skipa nýggja stovnin bæði bygnaðarliga, innihalds- og tænastuliga.

Nýggi stovnurin skal framleiða og geva út fjølbroyttar og dygdargóðar føroyskar undirvísingarmiðlar, sum lúka bæði fakliga og undirvísingarlig krøv, veita fakliga og námsfrøðiliga ráðgeving um undirvísing, undirvísingarmiðlar, kunningartøkni, umframt fyrisita og menna undirvísingarportalin Snar. Stovnurin skal røkta og menna samskiftiskervið í undirvísingarverkinum, hava námsfrøðiligan verkstað og kunna um undirvísingarmiðlar.

**Søkt verður eftir stjóra, sum**
- skal hava fyrisitingarligu, námsfrøðiligu, fakligu og fíggjarligu ábyrgdina av virkseminum á stovninum
- skal standa á odda fyri at menna stovnin, útgávuvirksemið, tøkniligu menningina og námsfrøðiligu tænastuveitingina, er framtakshugaður og dugir at síggja møguleikar og finna loysnir
- skal skapa virðing fyri stovninum, fremja góðar arbeiðsumstøður, trivnað og gott samstarv millum starvsfólk og tryggja, at starvsfólkini hava møguleika fyri førleikamenning
- skal ráðgeva Mentamálaráðnum í viðurskiftum, sum stovnurin umsitur.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava útbúgving og arbeiðsroyndir, sum eru viðkomandi fyri starvið.

Harumframt er tað ein fyrimunur, at umsøkjarar hava
- leiðsluroyndir frá almenna- ella privata arbeiðsmarknaðinum
- góð leiðslu- og samstarvsevni, umframt mennandi leiðslustíl
- vilja og evni at royna nýggjar leiðir
- góðan málførleika

**Vit bjóða**
Eitt spennandi og sjálvstøðugt starv við nógvum ymiskum uppgávum. Góðir møguleikar eru fyri fakligari og persónligari menning.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett frá 1. august 2010 ella so skjótt sum til ber. Setanarøkið er Mentamálaráðið og stovnar undir tí, og eigur tann, ið settur verður, at tola broytingar í starvinum.

Starvið verður lønt í 37. lønarflokki sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Tænastumannafelag landsins, uttan tó at vera tænastumannastarv. Harumframt verður goldið 15% í eftirlønargjaldi.

**Umsókn**
Umsókn saman við prógvi, c.v. og viðkomandi skjølum skal verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi 8. apríl 2010.

Umsóknin verður stílað til:
Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn, ella
send sum teldubræv til: mmr@mmr.fo

*Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu seta seg í samband við Leiv Harryson, aðalstjóra, ella Olaus Jespersen, deildarstjóra, á tlf. 306500, ella í teldubrævi til mmr@mmr.fo.*

**MENTAMÁLARÁÐIÐ · HOYVÍKSVEGUR 72 · POSTRÚM 3279 · FO-110 TÓRSHAVN· TEL. +298 30 65 00 · FAKS +298 30 65 55 · MMR@MMR.FO**

# Mars-kappingin

Sosialurin

## SUDOKU

Hvønn dag í mars mánaða verða Sudoku uppgávur at finna í Sosialinum.

Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.

Sendið okkum loysnina innan mánadagin 12. apríl 2010 kl. 10.00 og merkið brævbjálvan »Sudoku«.

**Drigið verður í viku 15.**

Fyri at vera við í kappingini, skal øll uppgávan verða loyst.

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2 | | | | 8 | | 6 | |
| 5 | | | | | 7 | 9 | 2 | |
| | 7 | | | 2 | 6 | | | |
| 7 | | 2 | | | | | 5 | |
| | | | | | | | | |
| | 4 | | | | | 2 | | 1 |
| | | | 6 | 4 | | | 9 | |
| | 8 | 3 | 5 | | | | | 7 |
| | 6 | | 7 | | | | 4 | |

Vinningurin í januar er ein **Sony Ericsson c510** fartelefon frá **Vodafone**

**Virði: kr. 1.775,-**

Navn: ____________________

Bústaður: ____________________

Telefon: ____________________



## Sony Ericsson C510

- Triple band, GPRS, Edge, 3G
- 2,2" TFT skíggi 256K litir
- 3,15 MP myndatól v/ autofocus og LED blitz, video
- Spøl v/rørslu, You Tube forrit, kalendari, telefonbók
- SMS, MMS, Email, Instant Messaging
- Bluetooth 2.0 við A2DP, USB
- WAP 2.0/HTML, Java
- 110 MB innbygd minni, kann útb. upp til 8 GB v/ M2 korti
- FM-Stereo radio, MP3
- Standbytíð upp til 430 t (2G)
- Talutíð upp til 9 t 30 min (2G)

**Sendið til: Sosialin · Boks 76 · 110 Tórshavn**
**Merkið brævbjálvan »Sudoku«**

vodafone